

## Hvassi vísti tenn

Genturnar umborð á Hvassa vunnu fyrstu tveir róðrarnar í kappingarárinum rættiliga trygt, men á Jóansøku kiksaði hjá teimum. Tá megnaði Drekin at seta seg á fremsta plássi, men hetta vildu genturnar úr Sundalagnum ikki hava sitandi á sær. Á Varmakeldu í Fuglafirði leygardagin gekk tó aftur betri hjá gentunum úr Sundalagnum. Tær fingu eina góða byrjan uppá róðurin, og tær høvdu eisini leiðsluna at kalla allan vegin inn eftir fjørðinum. Á málinum vóru tær góða hálva bátslongd framman fyri Tambar, so nú er triði sigurin hjá Hvassa komin í hús í ár, og við sigrinum eru tær sjey stig framman fyri Tambar og Drekan, sum hava eina harða kapping um annað plássið í FM-kappingini.

# einaráðandi




*Eysturoyingur hevur verið fullkomiliga einaráðandi í kappingini hjá 10-mannaførunum í ár, og á Varmakeldu var enn einaferð meir enn ein bátslongd niður til Vestmenningin á øðrum plássi.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

hvussu tað ber til, at bæði 10-mannafarið og 8-mannafarið í Runavík eru so væl fyri

- Tað er sjálvandi hørð venjing, sum liggur aftanfyri góðu úrslitini. Menn umborð á bæði Eysturoyingi og Heiðabátinum eru væl fyri, og vit hava eisini allir vant hart í fleiri mánaðir. Annars kann leggjast afturat, at kendi danski rógvarin, Eskild Ebbesen, sum hevur vunnið tvey gullheiðursmerki á Olympisku leikunum, leggur lag á venjingarnar niðri í Danmark, og hann hevur eisini í samstarv við felagið gjørt venjingarætlan fyri Eysturoyingin og Heiðabátin, sigur Ludvík við Stein.

### Støðið er hækkað

Nógv hevur verið tosað um kreppu í føroyskum kappróðri, tí bátatalið til tær ymisku stevnurnar er sera lágt. Frá 39 uppí 44 bátar hava tikið lut á teimum fýra stevnunum, sum higartil hava verið kring landið, og talið er sera lágt, um vit samanbera við undanfarin ár.

Ludvík heldur, at ein av grundunum kann vera, at støðið er so nógv hækkað í føroyskari rógving.

- Støðið er nógv hækkað hjá bátunum sum heild í føroyskum kappróðri. Rógvararnir venja nógv meir, og hetta hevur onkur av eldur rógvarunum, sum eru vanir við at fara í bátin á flaggdegnum, trupult við at góðtaka. Kappróðurin er tó komin har til, at tað er neyðugt at venja so nógv, so skal man vera við, so er man noyddur at góðtaka hetta.

Hann metir tó ikki, at hetta er nøkur kreppa í føroyskum kappróðri. Hann væntar, at áhugin fer at vaksa aftur komandi árini.

- Sum sagt, so er kappróðurin blivin meira seriøsur, og tað er helst eisini skilligt, at onkur av eldru rógvarunum ikki tímir at venja so nógv. Yngru rógvararnir eru tó vanir við, at kappróðurin er so seriøsur sum nú, tí hetta er tað einasta teir hava roynt. So eg rokni við, at um ikki so nógv ár vera øll ung kappróðraráhugaði klár at venja so nógv, sum bátarnar gera í dag, tí hetta er jú tað einasta, sum tey eru von við, sigur Ludvík.

### Ikki geva inniróðrinum skyldina

Nógv hava mett, at inniróðurin er ein av grundunum til, at áhugin fyri kappróðri er minkaður júst í ár, men her er Ludvík við Stein ikki samdur.

- Eg haldi faktiskt, at tað er nakað tvætl, at inniróðurin tekur rógvarar frá útiróðrinum, tí bestu innirógvararnir eru at finna á fleiri av bestu bátunum kring landið. Besti innirógvari í léttvekt hjá monnum, Lars Abrahamsen, rør m.a. við Eysturoyingi. Hyggja vit at kvinnunum, so rógva báðir teir bestu innirógvararnir við Ørnini, so eg haldi ikki, at vit skulu geva inniróðrinum skyldina.

Ludvík er greiður í sínum meiningum um føroyskan kappróður, og hann heldur heilt víst, at kappróðurin nokk skal blíva lív lagað í Føroyum aftur. Sum hann sigur, so er tað helst bert ein spurningur um tíð, áðrenn áhugin aftur er vaksandi fyri okkara tjóðarítrótt.

# Heiðabáturin sigraði aftur

**Heiðabáturin fekk fjórða sigurin á rað hjá 8-mannaførunum á Varmakeldu, men tað, sum flest helst bitu merki í, var stóra framgongdin hjá Árnfirðingi, sum hesa ferð tryggjaði honum eitt triðja pláss**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Heiðabáturin hevur verið nógv sterkastur í kappingini hjá 8-mannaførunum í ár, og tað vóru teir eisini á Varmakeldu leygardagin. Teir stýrdu róðrinum frá byrjan til enda, og sigurin hjá teimum var ongantíð í vanda.

Sámal Einarsson, sum er bátsformaður á Heiðabátinum, var eisini glaður um sigurin, og hann duldi ikki fy-ri, at teir ætlaðu at vinna allar róðrarnar í ár.

- Tað er altíð ein stór gleði at vinna ein róður, og tað er einki at ivast í, at tað er líka stuttligt hvørja ferð. Vit umborð á Heiðabátinum eru sera væl fyri í ár, og tað er ikki nøkur loyna, at vit hava sett okkum fyri at vinna stórt í hvørjum róðri í ár, segði Sámal.

- Hetta merkir tó ikki, at vit føla okkum tryggar á nakran hátt. Hinir bátarnir hava allir góðar, sterkar mans umborð, og teir kunnu meir enn so fara at gera ein vørr. M.a. hevur Árnfirðingur tikið seg sera nógv fram síðstu róðrarnar, og á Varmakeldu endaði hann á einum flottum triðja plássi. Vit ætla tó at koyra víðari á sama hátt komandi róðrarnar, sum vit hava gjørt fyrstu fýra róðrarnar, sigur Sámal at enda.

# Jarnbardur heldur kósini




**Eingin spenningur var í róðrinum hjá 6-mannaførum við kvinnum, tí Jarnbardur endaði heili fýra bátslongdir framman fyri Kollfirðing á øðrum plássi**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Síðstu stevnurnar hevur Kollfirðingur av øllum alvi roynt at givið Jarnbardi kapping, og munurin millum bátarnar er eisini minkaður frá stevnu til stevnu.

Soleiðis var tó ikki á Varmakeldu leygardagin, tí kvinnurnar á Jarnbardi settu bæði Kollfirðing og Lóm rættiliga uppá pláss, og munurin niður til Kollfirðing á øðrum plássi var heili fýra bátslongdir.

Róðurskvinnan á Jarnbardi, Jannie Dam Jacobsen, var sum vera man glað um sigurin.

- Tað er altíð stuttligt at vinna, og sjálvt um tað bert eru tríggir bátar við í kappingini, so er tað nú einaferð so, at man er við fyri at vinna, og tí er hetta ótrúliga stuttligt.

Hon heldur tó, at kvinnurnar umborð á Kollfirðingi kunnu blíva enn betri komandi stevnuarnar.

- Kollfirðingur hevur havt ymisk óhapp í gjøgnum árið, men síðstu stevnurnar er tað blivið nógv betri hjá teimum. Vit kunnu kanska vænta harðari kapping frá teimum, men eingin ivi er tó um, at vit ætla okkum at vinna allar stevnurnar í ár, sigur hon at enda.